

## - Alt stoypiarbeiði

*-Tín trygd fyri dygd!*

IDEFIX CONTRACTORS

Tel.: 21 37 26 | Tel.: 22 37 26 | e-mail: idefix@post.olivant.fo

*-Tín trygd fyri dygd!*

## - Lyklaklár hús!





IDEFIX CONTRACTORS

Tel.: 21 37 26 | Tel.: 22 37 26 | e-mail: idefix@post.olivant.fo

# Húsasmiður

STARVSLÝSING

### Arbeiðsuppgávur

Arbeiði fevnir í høvuðsheitinum um at røkja ymiskar timbur- og stoypiuppgávur.
Fyri rætta fólkið er talan um eitt starv við spennandi avbjóðingum, og sum gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

### Setanartreytir

Setanartreytir sambært nærri avtalu.

Starvið verður sett skjótast til ber.

### Førleikakrøv

Umsøkjari skal helst hava royndir innan omanfyri nevndu arbeiðsøkir.
Tað er umráðandi at tann ið settur verður, hevur góð samstarvsevni, og dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult.

### Umsóknir

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Anton Sigmarsson, Tel 21 37 26 ella Gundur Hansen 22 37 26



*-Tín trygd fyri dygd!*

IDEFIX CONTRACTORS

Tel.: 21 37 26 Tel.: 22 37 26 | e-mail: idefix@post.olivant.fo

W W W . S O S I A L U R I N . F O

# Búskaparfrøðingur til Føroya Tele

*„Many of the things you can count, don't count. Many of the things you can't count, really count"*

- Albert Einstein -



Føroya Tele hevur tørv á einum miðvísum og greinandi búskaparfrøðingi til Fíggjardeildina.

Telefyritøkur um allan heim – og soleiðis eisini Føroya Tele – virka á einum marknaði í støðugari broyting, og avbjóðingin komandi árini er at tryggja, at Føroya Tele eisini í framtíðini verður ein týðandi fyritøka í Føroyum, samstundis sum fyritøkan mennist uttan fyri Føroyar.

Føroya Tele er skipað sum eitt samtak við trimum dótturfeløgum og nøkrum tilknýttum feløgum. Virksemið hjá felagnum fer at økjast, eisini uttan fyri Føroyar.

Fíggjardeildin á Føroya Tele hevur ein sentralan leiklut í hesi tilgongd og hevur tørv á einum búskaparfrøðingi, sum skal verða partur av hesum arbeiði.

**Nakrar av uppgávunum á Fíggjardeildini eru:**

- At hava neyðugt eftirlit við dótturfeløgunum og m.a. fylgja við í fíggjarætlanini. Eisini verður gongdin í tilknýttu feløgunum fylgd.
- Við góðum greiningum og framskygdum arbeiði at tryggja, at leiðslan í fyritøkuni hevur neyðuga grundarlagið at taka avgerðir.
- At skipa fyri, at neyðug amboð eru at tryggja kunning til fyritøkuna og samstundis tryggja, at tøka dátutilfeingið verður brúkt til at menna fyritøkuna.
- At lýsa váðar, skipa eitt váðaumstýringsamboð og skipa regluliga uppfylging av hesum.

Vit kunnu bjóða eitt avbjóðandi starv í spennandi umhvørvi við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning.

**Førleikakrøv:**
Vit søkja eftir einum fólki við royndum innan fíggjarstýring og/ella roknskapi, sum hevur HD, cand.merc., cand.polit. ella líknandi útbúgving. Eisini verður dentur lagdur á góð samstarvsevni, evni at arbeiða sjálvstøðugt, fleksibilitet og hollan kt-kunnleika.

Starvið verður lønt eftir útbúgving og royndum sambært sáttmálanum við avvarðandi yrkisfelag ella samsvarandi kvalifikatiónum.

Meira fæst at vita um starvið frá Jan Petersen, fíggjarstjóra, á telefon 303101.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. juni 2007.

**Føroya Tele**, Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27, 110 Tórshavn

**Føroya Tele er samtak við Móðurfelag, FT Net, FT Samskifti og Televarpinum.**
**Í samtakinum eru 235 starvsfólk við sera fjølbroyttum útbúgvingum og royndum**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*